# Fundarfrásøgn

| | |
|---|---|
| Heiti: | Leiðslufundur |
| Sendast til: | Sigurð í Jákupsstovu (SíJ), Jørgen Meitilberg (JM), Malan Marnersdóttir (MM) |
| Til staðar: | SíJ, JM, HPJ |
| Skrivað hevur: | JM |
| Fundartíð: | Týsdagur, 25. november 2014 |
| Fundarstað: | SSS |

Mál til støðutakan:

- Einki mál innkomið.

Mál til umrøðu:

- Stýrisfundur 19. november 2014

Raksturin fyrstu tíggju mánaðirnar heldur seg innanfyri bæði fíggjarætlanarkarmin og játtanarkarmin, men tað verður neyðugt at vísa fíggjarligt skynsemi tað sum eftir er av fíggjarárinum, tí framskrivingin vísir eitt hall á umleið -281 t.kr.

Somuleiðis varð kunnað um nýggju útbúgvingarnar, sum vórðu lagdar fram á stýrisfundinum. Tær eru:

- MA í samfelagsfrøði (meistaralæra)
- Joint Nordic Masterprogramme; West Nordic Studies-Governance and Sustainable Management
- BSc í búskaparfrøði
- BA í lóg
- Kirkjusøga
- Orkuverkfrøði

- Leysalæraraavtalur

Fíggjarleiðarin hevur sent leiðsluni uppskot til mannagongd fyri leysalæraraavtalur til viðmerkingar. Leiðslan gjørdi viðmerkingar til mannagongdina.

- Mannagongd viðvíkjandi prógvtøkum

Av tí at mannagongdin í sambandi við prógvtøkur ikki hevur verið nóg greið alla staðni, hevði Lív L Lützen latið leiðsluni uppskot til mannagongd fyri prógvtøkur og prógvbókabløð.

Uppskotið varð viðgjørt og samtykt við smærri broytingum.

Niðurstøða

HPJ orðar eina áseting um innlatingaruppgávur v.m. sum fella eitt sindur uttan fyri mannagongdina. Somuleiðis skal yvirlit gerast yvir allar prógvtøkuformar á Setrinum. MM sendir sínar viðmerkingar fyri seg.

- Góðkenning frá MMR av Orkuverkfrøði og Jt Nordic Master

Sambært § 3 í ll. nr. 58 frá 9. juni 2008 um Fróðskaparsetur Føroya, sum broytt við ll. nr. 51 frá 8. mai 2012, skulu útbúgvingartilboð góðkennast av landsstýrismanninum.
Niðurstøða
JM sendir útbúgvingarprofilarnar av Orkuverkfrøði og Jt Nordic Master til góðkenningar í Mentamálaráðnum.

*fyrisitingarstjórin*